Bjørt Samuelsen
Henrik Old
Bjarni Hammer
Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot
til
3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 56/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Fiskidagaskipanin, leingja um gildistíðina á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 6, verða í § 19 sum stk. 5 og 6 sett:
   "Stk. 5. Landsstýrismaðurin skal leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um umsitingarætlan og veiðireglur, sum setir karmar og mannagongdir í sambandi við at áseta fiskidagatal.
   Stk. 6. Umsitingarætlanin skal sum meginreglu hava ásetingar um:
   1) Hvønn fiskastovn ella fiskiskap, ætlanin fevnir um.
   2) Endamálið við ætlanini, og hvørji atlit skulu takast, tá árligu fiskimøguleikarnir verða ásettir.
   3) Veiðireglu, sum verður brúkt sum grundarlag undir áseting av mest loyvdu veiðu, fiskidøgum og skipan í øðrum fiskiskapi.
   4) Mannagongdir fyri ráðgeving, ráðførslu o.a.
   5) Gildistíð og endurskoðan."

2. Í § 2 verður sum stk. 3 sett:
   "*Stk. 3.* § 19, stk. 5 og 6, sum ásett í § 1, nr. 6, verður galdandi fyri fiskiárið 2022 og frameftir."

Viðmerkingar
"Ein treyt fyri, at ein umsitingarætlan skal virka er, at hon er kjølfest í politiskum langtíðarsemjum –tvørtur um samgongur og valskeið", soleiðis stendur í frágreiðingini frá arbeiðsbólkinum, ið er løgd við hesum uppskoti sum fylgiskjal 2. Broytingaruppskotið hevur til endamáls at røkka hesum.

Málið er, at allur fiskiskapur í føroyskum sjógvi verður skipaður við umsitingarætlanum. Ein slík ætlan er ein skipan at umsita fiskastovnarnar yvir longri áramál við støði í reglum fyri burðardyggari veiðu, og við støði í umsitingarætlan, sum semja er um og sum byggir á lívfrøðiligar tilráðingar. Endamálið er stovnsrøkt og lívfrøðilig burðardygd, men umsitingarætlanin skal eisini taka vinnulig atlit, til dømis leggja upp fyri at tryggja vinnuni ávísan stabilitet, so at fiskimøguleikarnir ikki sveiggja ov nógv frá ári til ár. Bulurin í eini umsitingarætlan er ein veiðiregla (á enskum "harvest control rule", HCR), sum sigur, hvussu

stóran part vit taka úr fiskastovnunum á hvørjum ári. Veiðiregla verður m.a. brúkt sum grundarlag, tá árliga MLV'ið ella fiskidagatalið verður ásett.

Hetta broytingaruppskot leggur upp til, at landsstýrismaðurin við heimild frá Løgtinginum og innan fyri karmarnar av umsitingarætlanum, sum Løgtingið hevur góðkent, ásetir árliga fiskidagatalið fyri hvønn bólk í fiskidagaskipanini.

Í broytingaruppskotinum eru ikki settar inn ítøkiligar umsitingarætlanir, men bert ásetingar um, hvat ein umsitingarætlan, sum eitt minstamark skal innihalda.

Ein ítøkilig semja um umsitingarætlan fyriliggur fyri tosk, hýsu og upsa undir Føroyum, so skjótt er at leggja hana fyri tingið. Fyri aðrar stovnar kunnu umsitingarætlanir gerast, so skjótt Havstovan hevur útvegað neyðuga vísindaliga grundarlagið.

Sum meginreglu skulu umsitingarætlanirnar hava hetta innihald:

1) Umsitingarætlanin skal siga, hvønn fiskastovn ella fiskiskap talan er um. Her kann t.d. eisini vera talan um eina støðulýsing av, hvussu stovnurin er fyri. Støðulýsingin kann vera grundað á stovnsmetingar frá Havstovuni/ICES og annað viðkomandi tilfar.
2) Umsitingarætlanin skal siga, hvat málið er við stovnsrøktini, og hvussu málið verður rokkið. Í umsitingarætlanini kunnu tó onnur atlit takast enn tey reint fiskifrøðiligu. Til dømis kann eisini verða ásett, at fiskidagatal ella MLV ikki skal broytast meira enn eitt ávíst prosenttal, sammett við undanfarna fiskiár. Við hesum verður lagt upp til, at hóast vísindaligu tilráðingarnar tala fyri størri inntrivum, skulu tey ikki gerast í einum. Við hesum kennir vinnan eisini treytirnar og karmarnar eitt rímiligt tíðarskeið frameftir.
3) Mál og ætlanir fyri, hvussu vit skulu røkka málunum, verða gjørd ítøkilig í eini veiðireglu, sum byggir á ICES ráðgeving og tær meginreglur, ið har verða brúktar. Lívfrøðilig tilvísingarvirði verða sett fyri teir ymsu stovnarnar, og so skal vísindaliga ráðgevingin árliga meta um stovnsstøddir og veiðitrýst í mun til hesi virðir. Langtíðar veiðireglan skal vera við til at regulera veiðitrýstið, so at tað í miðal er í eini legu, sum ger, at stovnarnir geva ta størstu varandi veiðuna.
4) Í umsitingarætlanini skulu eisini vera ásetingar um mannagongdir og ráðgeving, tá landsstýrismaðurin ásetir árligu fiskimøguleikarnar – kvotur, fiskidagar ella annað. Her kann talan vera um, at í umsitingarætlanini verður sagt, hvat slag av ráðgeving Havstovan ella onnur skulu koma við. Ætlanin kann eisini hava ásetingar um, at ein partur av skipanini er ein nevnd ella líknandi, ið landsstýrismaðurin skal ráðføra seg við.
5) Í umsitingarætlanini eiga ásetingar at vera um gildistíð, og hvussu og nær ætlanin skal eftirmetast og møguliga endurskoðast.
Eftir broytingaruppskotinum er mannagongdin, at landsstýrismaðurin leggur allar umsitingarætlanir fyri Løgtingið sum uppskot til samtyktar, har Løgtingið góðkennir høvuðstættirnar og meginreglurnar í umsitingarætlanini.

Á Løgtingi, 16. desember 2020

Bjørt Samuelsen Henrik Old

Bjarni Hammer Bjarni Kárason Petersen